


**Nr. 15** ***21. juli 2024*** **84. árg.**

# Ert tú høgra- ella vinstravendur?

*Emanuel Minos*

Einaferð, tá ið eg var í Svøríki og talaði, kom ein blaðmaður har. Hann vildi hava eina samrøðu við meg. Eg ræðist tíðindafólk, tí tey eru so snúin og listinlærd og hava altíð eina dulda ætlan við sínum spurningum. Ein myndamaður fylgdist við honum. Blaðmaðurin smíltist og var so ógvuliga blíður; men jú blíðari hann var, jú verri ræddist eg hann og var á varðhaldi.

*„Nær talaðu tygum fyrstu ferð, Minos?“* spurdi hann.

*„Tá eg var 5 ár.“*

*„Og nær blivu tygum so andsdoyptur?“*

*„Tá eg var 7 ár.“*

Myndamaðurin var farin, og blaðmaðurin gjørdi seg eisini til at fara. Hann hevði bara spurt vanligar spurningar, so eg helt, at eg hevði gjørt honum órætt. Hann legði hondina á handtakið og skuldi lata hurðina upp; men tá snaraði hann sær brádliga á og spurdi: *„Minos, eru tygum høgra- ella vinstravendur?“*

*„So, nú kom tað! Nú leyp hann á við sínum listinlærdu spurningum,“* hugsaði eg. Eg suffaði upp til Harrans um hjálp, tí eg visti als ikki, hvat ið eg skuldi svara hesum manni. Svarið kom beinanvegin.

*„Eg eri Golgata-vendur!“* segði eg.

*„Ha?“* segði hann og gapaði við av bilsni.

*„Ja, tú veitst, at á Golgata hekk Jesus á tí mittasta krossinum. Hann, ið var høgrumegin, var ránsmaður, og hann, ið var vinstrumegin, var eisini ránsmaður. So tú sært, tað eru brek og mistøk bæði til høgru og vinstru. Loysningurin hongur í*

*miðjuni. Jesus doyði á Golgata fyri at bøta um brekini og syndirnar, sum mannabørnini til høgru og vinstru gera, tí eri eg Golgata-vendur!“*

*Effie Campbell* umsetti.

# Matti Haapoja

Er hjarta títt kanska sum hin beinfrysti bøurin? Soleiðis hevur tað ikki altíð verið. Tá ið tú vart barn og ungur, kendi tú tað púra øðrvísi har inni í hjartanum. Hjarta títt var sum ein undurfullur urtagarður, sum summarbøurin í fullum blóma. Men har komu so nógvar frostnætur í lívinum. Nú er urtagarðurin skamfílaður og oyðilagdur, og ikki eitt stað, sum hóskar til bústað hjá Himmalsins kongi.

Matilda Wrede, konan, sum í ein mansaldur livdi og arbeiddi fyri fangarnar í Finnlandi, kemur ein dagin inn í tað fangarúmið, har landsins herviligasti brotsmaður, Matti Haapoja, situr. Tung jørn eru smíðað um háls hansara, hendur og føtur. Eingin veit, hvussu nógv lív hann hevur á samvitsku síni. Hvørki prestur, dómari ella vaktarmanningin hava verið før fyri at treingja ígjøgnum ta hørðu brynjuna, hann hevur umgyrt seg við.

Matti Haapoja verður varur við Bíbliuna, sum henda unga kvinnan hevur í hondini. Hann fer at háða hana og ta heilagu bókina. Hann hevur so ofta hoyrt, at hon plagar at siga við fangarnar, at orðini í tí svørtu bókini galda teir. Men hann, Matti Haapoja, veit so vist, hvussu tað ber til. Frúgvin Wrede velur frammanundan eini tvey skriftstøð, sum hóska til fangarnar, og so fyrireikar hon ta taluna, hon ætlar sær at halda fyri teimum. „Men um nú eg sjálvur blaði upp á eitt skriftstað, vil frúgvin so upp á standandi fót útleggja tað og vísa, at tað geldur meg?“

So blaðar Matti Haapoja upp á fyrstu síðu í Bíbliuni, og Matilda Wrede lesur stillisliga: „Í fyrstuni skapaði Gud himmalin og jørðina. Og jørðin var oyðin og ber, og myrkur var yvir frumhavinum, og Guds andi lá á vøtnunum. Og Gud segði: „Verði ljós!“ Og tað varð ljós.“

„Tann jørðin, sum Gud hevur skapað,“ segði hon, eftir at tøgn hevði verið eina løtu, „er ikki bert jørðin har úti við oyðimarkarinnar villu fløtum, vøtnum og stórum skógum, við trøum, urtum og blómum – nei, tað er eisini mannahjartað, tað er Mattisa egna hjarta.

Og tann jørðin, sum er hjartað hjá Matti, er eisini oyðin og tóm. Tóm fyri alt gott og reint, eymt og kært, fyri friði og gleði. Har vaksa ongar blómur, har búnast eingin frukt. Hví? Jú, myrkur stígur upp úr dýpinum, og myrkrið drepur alt lív.

Matti hevur eina avgrund inni í hjarta sínum – sum vit øll hava ella hava havt – og hon er myrkari enn náttin. Matti veit sjálvur um hana, torir ikki at hyggja niður í tað svarta, botnleysa dýpið.

Gud segði: „Verði ljós!“ og tað varð ljós. – Gud kann fylla avgrundina við ljósi – hann er hin einasti, sum kann gera tað. Um nú Matti ber sítt oydna og tóma hjarta við avgrundarmyrkrinum, sum drepur alt ljós, fram fyri Gud, tá vil Gud siga: „Verði ljós!“ Og tað skal henda.“

Og Matti græt – græt um seg sjálvan og yvir spilta lív sítt. Ísurin bráðnaði. Iðranartár eru eitt signað regn yvir ta turru jørðina. Men tað er ikki nóg mikið. Guds mildu náðistreymar mugu falla sum várregn, so at allur ísurin skal bráðna, so sáðið kann spíra í hjartaakrinum.

Títt og mítt hjarta er eisini oyðið og tómt, liggur í djúpasta myrkri, til Harrin Jesus sleppur at geva tí ljós og hita. Tá broytist tað, tá verður tað til ta jørðina, har hin himmalski sáðmaðurin kann sáa hitt góða sáðið: Guds orð. Tí at granska Guds orð, tað hoyrir við til fyrireikingina at møta Konginum. Annars kann hjarta títt ongantíð gerast ein urtagarður, sum blómar honum til heiðurs.

*Effie Campbell* umsetti.

# Tað verður betri hægri uppi

*Úr endurminningum D. L. Moodys*

Ein kvinna, sum var eitt kært Guds barn, var sjúk og lá fyri tað mesta bundin til songina. Ein trúgvandi kona, sum æt Elly, kom av og á at vitja hana, og hvørja ferð var henda sjúka altíð glað og nøgd.

Elly hevði eina ríka vinkonu, Magda, sum hevði lyndi til at stara at lívsins myrku skuggasíðum, og tí var hon ofta tunglynt og óglað. Elly helt, at tað fór at verða Magdu til signingar at vitja hesa sjúku konuna, og tí tók hon hana við sær út hagar, sjúklingurin búði.

Tær skuldu upp í eitt takkamar uppi á 5. hædd. Tá ið tær komu upp á 1. hædd, segði Magda: „Sum her er myrkt og skitið!“

„Tað verður betri hægri uppi," svaraði Elly.

Tær komu so eina hædd hægri upp, og har gekk á sama hátt. Magda gramdi seg aftur og fekk sama svarið: „Tað verður betri hægri uppi!"

Uppi á 3. hædd tóktist tað at vera uppaftur verri, og Magda grenjaði og fekk aftur svarið: „Tað verður betri hægri uppi!"

At enda komu tær upp á 5. hædd, og tá ið tær komu inn á sjúkrakamarið, lá eitt vakurt teppi á gólvinum, blómandi urtapottar stóðu í vindeygakarminum, og tveir fuglar sótu í einum búri og sungu.

Her lá so hin sjúka konan, ein teirra, sum Gud brýnir til sítt egna tempul. Hon lýsti av gleði. Magda segði við hana: „Sum tað man vera ringt at liggja her!"

Hin sjúka smíltist til hennara og svaraði: „Á, tað verður betri hægri uppi!"

Latið okkum minnast til tað í mótgangsdøgum: Hjá Guds børnum verður betri hægri uppi.

*Effie Campbell* umsetti.

## Sterkasta vernd – Jesu blóð

Ein evangelistur í Indonesia sigur soleiðis: „Eitt kvøldið var eg á veg heim av einum møti. Eg gekk gjøgnum ein skóg. Tá sá eg nakað, sum eg helt vera ein træstokk. Men tá ið eg kom nærri, reistist ein stór slanga, og hon var til reiðar at leypa á meg. Tá rópti eg hart: „Jesu blóð!" Og slangan hvarv.

*e.c.* ums.

---

„Hitt einasta, ið kann bjarga heiminum úr trupulleikum og øllum tí ónda, er at venda aftur til hin gamalsliga kristindómin við teimum gomlu kristnu virðunum, sum mugu gjøgnumsýra eitt fólk, um mentan okkara skal vara." (Haakon VII 1872–1957).

*e.c.* ums.

---

Frelsarin frelsir frá ævigari glatan til ævigt lív.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 16** ***4. august 2024*** **84. árg.**

# Ein klók loysn

*Terje Bilet*

Hetta er søgan um abba mín, Karl Bilet, tá ið hann sum trúgvandi stóð í einum torførum vali. Men hann bað Gud geva sær vísdóm, soleiðis sum Skriftin sigur í Jákups br. 1,5. Og hann fekk vísdóm!

Abbi var skúlavørður við hægri skúlan í Fredrikstad í mong ár. Bæði næmingar og lærarar dámdi hann væl, og tey høvdu virðing fyri honum. Hann var ærligur sum fáur og slakaði ongantíð mótvegis kristnu trúgv síni. Einaferð undir krígnum, meðan Noreg var hersett, kom hann í ta støðu, at hann skuldi taka eitt torført val. Longdi armurin hjá týska hersetingarvaldinum kravdi, at myndin av „Føraranum“ skuldi verða hongd upp á skúlanum staðin fyri myndina av táverandi konginum, Hákuni 7.

Hann visti, at um hann sýtti, hevði tað verið at bjóða gestapo av, og tað hevði fingið álvarsligar avleiðingar, ikki bara fyri hann, men fyri alla familjuna.

Tankarnir arbeiddu undir trýsti, og hann var púra ráðaleysur: „Skuldi hann, Karl Bilet, heingja myndina av Hitleri upp staðin fyri okkara kæra Hákun kong? Nei, tað mátti ikki henda!“

Men hvussu skuldi hann snúgva sær undan boðunum hjá týskarunum? Trupulleikin tóktist óloysandi. Men so brádliga ljóðaðu boðini av nýggjum innan í honum: Myndin av Føraranum skuldi heingjast upp! Orðið Førarin ljóðaði aftur og aftur, Førarin, Førarin, Førarin. Á, ja, sjálvandi! At hann ikki hevði

hugsað um tað fyrr: Kristus er okkara Førari, Kristus Jesus er loysnin!

Tá ið týskararnir seinni komu at kanna um alt nú var, sum tað skuldi, sóu teir myndina av Jesusi Kristusi staðin fyri Hitler! Tá ið teir stóðu framman fyri hesi klóku loysnini, vórðu teir týsku offiserarnir heilt avvápnaðir og fingu einki gjørt, tí vegna propagandaátakið hjá Hitleri bar ikki til at seta Føraran hægri enn Kristus. Tað hevði verið vandamikið og hevði skapað stóra mótstøðu í fólkinum. Týskararnir smekkaðu hælirnar saman og gjørdu hermannakvøðu – og fóru út úr skúlanum! Og glaður var abbi og fullur av tøkk til sín Harra og Meistara.

*„Tro & Fakta"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Hele himmelen er åpen over meg

*„Eftir hetta sá eg, og sí, tað vóru opnar dyr á himninum."* Opb. 4,1.

Mær dámar so væl ein norskan sang, sum kallast „Hele himmelen er åpen over meg". Tað er júst tað, sum er veruleikin. Bíblian sigur: „...hann (Jesus) vígdi okkum atgongd, nýggjan og livandi veg inn ígjøgnum forhangið." Hebr. 10,20. Tí kunnu vit í Jesu navni fara beint inn til náðitrúnuna og biðja Gud hjálpa okkum. Forhangið inn til tað allarheilagasta skrædnaði úr erva og líka niður ígjøgnum. Gud sjálvur skræddi tað, vegurin liggur opin inn hagar.

Eg veit ikki, hvussu tú hevur tað beint í løtuni. Men kennir tú tað, sum allir vegir eru læstir, og eingin hjálp er at fáa nakrastaðni, so skalt tú vita, at vegin uppeftir kann eingin læsa fyri tær. Ger, sum henda konan, eg nú skal siga tær frá, rópa á Gud í Jesu navni og bið hann hjálpa tær.

Undir krígnum var tað ein genta, sum búði í einari lítlari bygd í Eysturoynni. Hon gjørdist góð við ein eingilskmann og hann við hana. Hann var so fittur og dámligur, helt hon. Hann segði, at hann búði í einum stórum og flottum húsum í London, og hann vildi, at tey skuldu giftast, áðrenn teir fóru víðari. Tey giftust so.

Tá ið hon kom til London, var einki, sum hon helt tað fór at verða. Húsini vóru eini stór íbúðarhús og meir at kalla vánalig. Maðurin broyttist eisini fullkomiliga. Hann gekk um

kvøldarnar inn á ølstovurnar, og tá ið hann kom heim aftur, var hann drukkin og gjørdi seg mangan inn á hana.

Eitt sunnukvøld var hon einsamøll inni sum vant, og hon var í dýrastu neyð. Hon kendi ongan at biðja hjálpa sær, og hon ræddist mannin. Hon fall á knæ á køksgólvinum og rópti á Gud. Tá hoyrdi hon skilliga eina rødd tosa uttanífrá og inn gjøgnum oyrað á sær: „Reis teg upp, lat teg í og far út hiðani, áðrenn maður tín kemur aftur!“

Hon so gjørdi. Tá ið hon kom út í tún, snaraði hon um hornið á húsinum. Tá sá hon ein mann ganga beint framman fyri sær. Hon sá bara í ryggin á honum. Hann hevði sítt, grátt hár og var í einum ljósum, síðum yvirfrakka. Tá hoyrdi hon røddina fyri aðru ferð. „Far aftan á hasum manninum!“

Hann gekk oman eftir fleiri gøtum og hon aftaná. So fór hann alt í einum oman gjøgnum einar lítlar trappur og inn í ein kjallara. Hon fór eisini oman gjøgnum hesi trý trini og inn í kjallaran. Tá var tað hølið hjá Frelsunarherinum, og tey vóru komin inn á eitt sunnukvøldsmøti.

Tá ið konan hugdi uttan um seg, var maðurin alt í einum horvin. Hon fór upp gjøgnum trappurnar at vita, um hon sá hann úti á gøtuni. Men har var eingin. Tá gjørdist konan greið um, at maðurin hevði verið ein eingil.

Tey í Frelsunarherinum hjálptu henni, og so var øll neyðin av.

*Effie Campbell.*

# Tú hevur ikki skyldina

Ein sjúkrahúsprestur greiðir soleiðis frá: „Tá ið fólk gerast álvarsliga sjúk, missa tey tamarhaldið á lívi sínum. Tá ið sjúklingarnir spyrja, hvat ið teir hava gjørt, síðani sjúkan rakar teir, svari eg, at í kristindóminum er einki samanhang millum skuld og lagnu.

Job er óður við Gud vegna líðing sína, men avsannar uppáhaldið, at hon skuldi verið ein revsing frá Gudi. Í Matt. 5,45 stendur: „Hann letur sól sína rísa fyri illum og góðum og letur regna niður yvir rættvís og órættvís.“

Trúgvin gevur ugga og frið, tí vit kunnu leggja lív okkara í Guds hond. Nógvir sjúklingar kenna seg einsamallar og burturgloymdar, tá ið teir liggja í sjúkrahússongini úti á tromini á lívinum. Men tá kann eg vissa teir um, at teir eru ikki

teir fyrstu. Guds sonur kendi seg einsamallan, tá ið hann hekk á krossinum í størstu líðingini. Og kortini reis hann upp triðja dagin. Tað merkir, at hóast tað kennist, sum at alt er mist, so halda vit, sum eru kristin, fast í vónini! Tað er altíð meir at siga. Tað er altíð grund til uppreisn hóast okkara umstøður.

Ferð eftir ferð sigur Jesus við lærusveinar sínar: „Óttist ikki!“ Og tað sama sigur eingilin við kvinnurnar, tá ið tær koma til Jesusar tómu grøv.

Hasi orðini virka á sama hátt, sum tá ið foreldur siga tey við børn síni. Foreldur kunnu heldur ikki verja børn síni móti verðini og móti sjúkum, men tey kunnu skapa tryggleika. Mangt er tungt og pínufult, men óttast skulu vit ikki.“

*Effie Campbell* umsetti.

# Prógv

*„Men lat nú boð fara um og savna til mín á Karmelfjalli allan Ísrael saman við teim fýra hundrað og fimmti Báalsprofetum og teimum fýra hundrað Ásjeruprofetum, ið sita til borðs hjá Jesabel!“ 1. Kong. 18,19.*

Tá ið tú lesur onkra vísindaliga grein um Gud og trúnna, eisini slíkar, sum „kristin“ hava skrivað, tá sært tú ofta henda setningin: „Vit vita jú, at trúgvin á Gud í veruleikanum ikki kann prógvast.“

Hvat meina tey? Í 1. Kongabók bjóðar Elias teimum av, sum tilbóðu falskar gudar. Hann segði: „Møtið mær á Karmel! Tann Gud, sum svarar ... hann er Gud! Og fólkið segði: „Tað er rætt!“ Tí tað er sanniliga prógv – bæði fyri høvd og hjarta, tá ið Gud svarar.

*TF-blaðið. Effie Campbell* umsetti.

---

Muslimar søkja fyrigeving, og teir trúgva eisini, at bønirnar, teir biðja undir Ramadan, hava eina serliga kraft. Vit siga teimum, at tað er ein Gud, sum hoyrir bønir teirra alla tíðina, og at fyrigevingin er longu givin gjøgnum Jesus.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74